# Broyta framsýning

Seinastu tíggju árini hevur Fornminnissavnið havt somu framsýning, men nú er gjørt av at broyta hana, og tí verður framsýningin í Brekkutúni í Hoyvík stongd til hálvan mai. Tá verður tann nýggja klár. Ætlanin hjá savninum er, at tann nýggja framsýningin skal gera meiri burtur teimum eldru pørtunum av okkara søgu og tí fornfrøðiliga tilfarinum, sum savnið eigur á goymslu. Í sama viðfangi fáa gólvini og ljósskipanin ábøtur.

# 100 tkr. til B71

Tað var ikki eiti á gáva, sum B71 fekk frá Sands Kommunu, nú felagið aftur hevur vissað sær sæti í fremstu føroysku fótbóltsdeildini. Á móttøku í gjárkvøldið læt kommunan gávur til bóltfelagið í oynni og til Ragnvald Joensen, sum her fyri stóð seg so sera væl á Special Olympics. B71 fekk ein málning umframt ein kekk á 100.000 kr. Ragnval fekk ein kekk á 5.000 kr. Páll á Reynatúgvu, borgarstjóri, fegnaðist á móttøkuni um góðu úrslitini hjá Ragnvaldi og hjá B71, eins og hann vísti á týdningin, sum eitt virkið ungdóms- og frítíðarlív hevur fyri trivnaðin í oynni.







Jógvan Fríðriksson heldur, at breki eigur at takast við einum skálkabrosi

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, setti føðingardagshaldið hjá MBF. Framman fyri situr ein deyvatulkur




– Menniskjur við breki mugu vera sjónlig, tí politikararnir taka sær ikki av teimum ósjónligu trupulleikunum, vísti fyrrverandi landsrættardómarin á, og legði aftrat, at tað eru ongir lættir sigrar hjá minnilutabólkum.

Holger Kallehauge greiddi eisini frá sáttmálanum sum ST skjótt skal góðkenna, og sum skal tryggja brekaðum somu rættindi sum øll onnur, og allar reglur eru greiðar og allýstar.

–Við konventiónini verður forboð fyri at diskriminera brekað fólk, og trupulleikin við, at vit eru ein ósjónligur minnilutabólkur verður eisini loystur við hesum, greiddi Holger Kallehauge frá.

## Samfelagið ber brek

Síðstur á pallinum var sjálvur formaðurin í Megin-felag teirra Brekaðu. Leila Solmunde greiddi frá bóklinginum um atkomu, sum hevur fingið navnið "Skráin – yvirlit og vegleiðing um atkomu".

Henda bókling fekk forkvinnan í Kommunufelag Føroya, Rósa Samuelsen, handað frá Leilu Solmunde, og tað sama fekk Heðin Mortensen, formaður í Kommunusamskipan Føroya.

Leila Solmunde staðfesti, at tað er samfelagið, sum ber eitt brek og ikki tey, tá tað ikki er pláss fyri øllum.

Føðingardagshaldið hjá Norðurlandahúsinum í MBF endaði við, at boðið var til pinnamat og vín.

Vert er annars at hefta seg við, at fleiri landsstýrismenn vóru uppmøttir til føðingardagshaldið og lýddu á meðan løgmaður setti tiltakið. Men eftir steðgin var at kalla ongin teirra eftir og lýddi á.